# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 19.02.2024 kl. 17.00

| | |
|---|---|
| Á fundi: | Janus Thomsen |
| | Thorstein Thomsen |
| | Martin í Nesi |
| | Eir J. Norðberg |
| | Poul Laust Christiansen |
| Ikki møtt: | Niels Olaf Eyvindsson |
| | Ronni Hammer |
| Skrivari: | Johanna B. Djurhuus |

Thorstein Thomsen luttók ikki í viðgerðini av máli nr. 1

1. **102-5-2024: Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Hvalbiar Sóknar Kappróðrarfelag.**

   Søkt verður um fíggjarligan stuðul til kappingarárið 2024.

   **Trivnaðarnevndin 15.02.2024:**

   Nevndin mælir til at stuðla við kr. 25.000,00.

   **Fíggjarnevndin 19.02.2024:**

   Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla við kr. 25.000,00, treytað av, at báturin verður mannaður og luttekur á FM-stevnum í summar.

   **Avgerð:**

   Samtykt varð við trimum atkvøðum fyri at fylgja tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini.

2. **102-4-2024: Góðkenning av roknskapi 2023 hjá Hvalbiar skúlabókasavni.**

   Roknskapurin hjá skúlabókasavninum fyri 2023 javnvigar við kr. 38.088,00.

   **Trivnaðarnevndin 15.02.2024:**

   Nevndin hevur góðkent og undirskrivað roknskapin.

   **Avgerð:**

   Samtykt varð einmælt at góðkenna roknskapin hjá Hvalbiar skúlabókasavni 2023.

3. **102-8-2024: Umsókn um sundurbýti – matr. nr. 22a og 98b, Hvalba.**

   Søkt verður um sundurbýti av matr. nr. 22a og 98b. Stykkini skulu leggjast saman við matr. nr. 343 og nýtast til framtíðar parkering.

   **Avgerð:**

   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um sundurbýti og geva frávik í mun til byggisamtyktina, ið verður broytt samsvarandi umsóknini, tá næsta broyting verður gjørd í byggisamtyktini. Somuleiðis varð samtykt, at atkomuvegur framvegis skal verða til matr. nr. 22a.

**4. <u>Ikki almenn mál</u>.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.00

Janus Thomsen Martin í Nesi Thorstein Thomsen

Eir J. Norðberg Poul Laust Christiansen